


# Pensjónsnýskipanin

## *– Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar*

*Talið av eldri fólki í Føroyum er skjótt veksandi, meðan talið av arbeiðsførum verður nærum óbroytt. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst.*

Juni 2009

# Trupulleiki

- Demografiska og fíggjarliga gongdin:
  - Fleiri eldri og óbroytt tal av arbeiðsfør.
  - Útreiðslur til eldrarøkt og pensjónir veksa skjótt.
  - Óbroytt tal av arbeiðsførum merkir, at skattainntøkurnar veksa seint.

- Eldraútreiðslurnar vaksa so nógv at tað førir til økt skattatrýst, frá flyting og fíggingartrupulleikar.

- Landskassin fer ikki longur at kunna røkja sínar skyldur.
  - Landskassin fer ikki longur at kunna fíggja pensjónir og røktartænastur.

- Tað er tí neyðugt at gera stórar broytingar av almennu og persónligu pensjónsskipanunum.

# Dagsskrá

1. **Framskrivingar**
   - Demografiskar
   - Fíggjarligar

2. **Uppskot til pensjónsnýskipan**
   - Málsetningur
   - Almannapensjón
   - Lógarbundin uppsparing

3. **Búskaparliga ávirkanin**

# Demografiskar framskrivingar

| | 2009 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|
| **0-19** | 15 | 14 | 14 | 13 | 13 |
| **20-64** | 27 | 28 | 27 | 26 | 26 |
| **65+** | 7 | 9 | 11 | 13 | 13 |
| **Tilsamans** | **49** | **51** | **52** | **52** | **52** |

**Tøl eru í tús. fólk*



# Demografiskar framskrivingar

| | Væntað livitíð hjá 60 ára gomlum | Ár sum eftirlønari |
|---|---|---|
| **1971-75** | 79,0 | 12,0 |
| **2001-05** | 82,0 | 15,0 |
| **2045-50** | 86,5 | 19,5 |



# Sosiali sáttmálin

- Óskrivaði sosiali sáttmálin:
  - Tey arbeiðsføru gjalda pensjónir og vælferðartænastur fyri tey eldru við tí óskrivaðu fyritreyt, at tá tey gerast gomul, rokna tey við, at tey, sum tá eru arbeiðsfør, gjalda teirra pensjón og vælferðartænastur.

- Sosiali sáttmálin fer ikki at halda í framtíðini.
  - Tey, sum í framtíðini vera í arbeiðsførum aldri, vera ov fá at gjalda fyri pensjón og vælferðartænastur til so nógv.

# Fíggjarligar framskrivingar

*Almanna- og heilsuútreiðslur til fólk eldri enn 65 ár framskrivað við gongdini í talinum av eldri fólki:*

| | 2009 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fólkapensjónir | 426 | 551 | 684 | 804 | 820 |
| SAMEG | 179 | 232 | 287 | 338 | 345 |
| Almannaútreiðslur | 335 | 433 | 537 | 632 | 644 |
| Heilsuútreiðslur | 304 | 394 | 488 | 574 | 585 |
| **Til samans** | **1.244** | **1.610** | **1.996** | **2.348** | **2.394** |
| *Indeks fyri tal av eldri fólki* | 100 | 130 | 161 | 189 | 192 |

*Viðm.: Í føstum prísum, øll tøl eru í mió. kr.*

# Árliga hall á fíggjarlógin á 1.300 mió. kr.

| | Eldraútreiðslur í % av BTÚ | Hall á FL hvørt ár |
|---|---|---|
| **2009** | 9,57 | - |
| **2020** | 12,18 | 340 |
| **2030** | 15,34 | 751 |
| **2040** | 18,93 | 1.217 |
| **2050** | 19,42 | 1.280 |

- Eldraútreiðslurnar vaksa úr umleið 10% upp í 20% av BTÚ.
- Hetta svarar til, at árligu útreiðslurnar á fíggjarlógin høvdu verið 1,3 mia. kr. størri enn í dag.

# Málsetningar

***Endamálið er at skipa viðurskiftini soleiðis, at vit fáa eina fíggjarliga haldføra pensjónsskipan, ið tryggjar øllum pensjónistum ein virðiligan og góðan aldurdóm***

Skipanin skal byggja á 3 súlur:

- <u>Súla 1:</u> Fólkapensjón, sum tryggjar eina minstu inntøku.
- <u>Súla 2:</u> Eina persónliga uppsparing, sum tryggjar ein rímiligan lønardekning hjá teimum, sum hava møguleika at spara upp sjálvi.
- <u>Súla 3:</u> Eina fría uppsparing hjá teimum, sum hava serligan tørv og ynskir.



# Nýggja pensjónsskipanin

**Pensjónsskipan**

| **Súla 1:** | **Súla 2:** | **Súla 3:** |
|---|---|---|
| **Ein fólkapensjón**<br>Mótrokna í øllum.<br>Skattskyldugar,<br>men fáa ein frádrátt<br>Javna við løn - 1%.<br><br>**Mótrokna við 25% frá fyrstu krónu**<br><br>**SAMEG sum í dag** | **15% lógarbundin uppsparing**<br><br>Í mesta lagi<br>10% kapitalútgjald.<br><br>Av restini:<br>Minst 50% lívrentu<br>Restina til ratueftirløn | **Frí uppsparing yvir 15 %**<br><br>Í mesta lagi<br>20% kapitalútgjald.<br><br>Lívrentu ella<br>ratueftirløn |

**Livitíðarindeksera pensjónsaldurin**

# Samanseting av inntøku






Fíggjarmálaráðið

# Súla 1: Ein fólkapensjón

- Leggja grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar saman til eina fólkapensjón. Kann mótrokna í uml. 70% av pensjónin.

- Um landskassin fær møguleika at mótrokna í størri parti av inntøkuni, so minkar hetta um inntøkuna hjá teimum, sum longu hava eina góða eftirløn og/ella høga lønarinntøku.

| | **SAMEG** | **Grund-upphædd** | **Viðbót og viðbót til ávísar** | **Almanna-pensjónir tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| **Giftur** | | | | |
| • Í dag | 2.500 | 3.313 | 2.373 + 297 | **8.483** |
| • Uppskot | 2.500 | 0 | 5.983 | **8.483** |
| **Stakur** | | | | |
| • Í dag | 2.500 | 4.169 | 3.065 + 594 | **10.328** |
| • Uppskot | 2.500 | 0 | 7.828 | **10.328** |

Fólkapensjón

# Súla 1: Fast javning av pensjónin

- Javning í dag:
  - Viðbót: 3%.
  - Grundupphædd: Ongin javning.

- Uppskot:
  - Lønarjavna pensjónirnar við lønarhækking minus 1%.
  - Minni enn full lønarjavning.
  - Meiri enn prísjavning.
  - Fylgir búskapargongd og reallønargongd.
  - Javnari útreiðsluvøkstur.

# Súla 1: Skattskyldugar, men geva ein frádrátt í skattinum

- Gera allar almannapensjónirnar skattskyldugar.
  - Fólk við góðum pensjónsinntøkum og lønarinntøkum koma at gjalda ein meira rímiligan skatt.
- Geva ein frádrátt í skattinum, so broytingin er inntøkuneutral fyri ein pensjónist, sum ikki hevur aðrar inntøkur enn almenna pensjón.
- Frádratturin verður 21.707 kr./ár fyri støk og 15.453 kr./ár fyri gift í 2010.

# Súla 1: Mótrokna frá fyrstu krónu við 25%.






Fíggjarmálaráðið

# Súla 1: Livitíðarindeksera pensjónsaldurin

Hækka pensjónsaldurin, so hvørt væntaða livitíðin hækkar.

| | Hækking av pensjónsaldri | Pensjónsaldur |
|---|---|---|
| 2012 | 0,5 | 67,5 |
| 2017 | 0,5 | 68 |
| 2022 | 0,5 | 68,5 |
| 2027 | 0,5 | 69 |
| 2032 | 0,5 | 69,5 |
| 2037 | 0,5 | 70 |
| 2042 | 0,5 | 70,5 |
| 2047 | 0,5 | 71 |

# Súla 2 og 3: Lógarbundin og frí uppsparing

- Súla 2: Lógarbundin uppsparing á 15% til øllum.
  1. 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn.
  2. Tað er loyvt at keypa tryggingar. Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til uppsparing.
  3. Eftirlønaruppsparing kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum (í løtuni 67 ár).
  4. Í mesta lagi 10 % kapitalútgjald. Kapitalútgjald verður skattað við 45%.
  5. Av restini, skal minst 50% nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár.
  6. Er uppsparingin við pensjónsaldur minni enn 100.000 kr., kann hon øll gjaldast sum kapitalútgjald. Er uppsparingin minni enn 400.000 kr., kann øll uppsparingin gjaldast sum ratueftirløn.

- Súla 3: Sjálvboðin uppsparing yvir 15%.
  1. Ratueftirløn ella lívlanga veiting.
  2. Í mesta lagi 20 % kapitalútgjald.

# Súla 2 og 3: Lógarbundin og frí uppsparing

| | Súla 2 | | | Súla 3 | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Lógarbundin uppsparing | | | Frítt | |
| Uppsparing | 15 % uppsparing o.a. av allari skattskyldugari inntøku | | | Eyka inngjald | |
| Útgjald | Maks 10 % | Minst 90% útgjaldast soleiðis: | | Maks 20 % | Minst 80 % |
| | Kapital-útgjald | Minst 50 % | Maks 50 % | Kapital-útgjald | LV ella RE |
| | | Lívlang veiting | Ratueftirløn | | |

# Búskaparliga ávirkanin av pensjónsnýskipanini




| | Eldraútreiðslur uttan tiltøk | | 1. Økt uppsparing: Skattur og mótr. | 2. Hækka pensjónsaldur | 3. Lønarjavning minus 1% | 4. Samvariatión millum 2 og 3 | Eldraútreiðslur eftir tiltøk | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | % av BTÚ | mió. kr. | mió. kr. | mió. kr. | mió. kr. | mió. kr. | % av BTÚ |
| **2009** | **1.244** | **9,57** | 0 | 0 | 0 | 0 | **1.244** | **9,57** |
| 2020 | 1.584 | 12,18 | 20 | 71 | 74 | 5 | 1.423 | 10,95 |
| **2030** | **1.995** | **15,34** | 92 | 143 | 171 | 21 | **1.611** | **12,39** |
| 2040 | 2.461 | 18,93 | 217 | 205 | 297 | 46 | 1.789 | 13,76 |
| **2050** | **2.524** | **19,42** | 329 | 231 | 385 | 68 | **1.648** | **12,68** |

# Samandráttur

- Um allar broytingarna verða framdar, so veksa útreiðslurnar bert til 13% av BTÚ, svarandi til eitt hall á FL á umleið 400 mió. kr.
- Tiltøkini loysa sostatt 70% av fíggingartrupulleikanum.

- Broytingarnar mugu fremjast nú. Seinni inntrivini verða gjørd, størri mugu tey vera, og knappligar skattahækkingar, t.e. minking í tøku inntøkunum gera stóran skaða, m.a. fráflyting.

- Eitt samlað uppskot.